## Skulu steðgast í havnunum

Skipanin sum NEAFC-londini innførdu 1. mei umfata limalondini, ið eru ES-londini, Russland, Ísland, Grønland, Norra og Føroyar. Fyri at eitt útlendsk skip skal kunna landa frystan fisk í eini havn í hesum londunum, mugu allir partar fylgja somu krøvum. Tá eitt skip gevur boð um at tað skal inn at landa, so skal flagglandi (heimlandi há skipinum), staðfesta yvirfyri havnalandinum at:

- skipið hevur kvotu til at fiska
- at veiðan er skrásett og avrokna í kvotuskipan
- at skipið hevur lov at fiska í økinum
- at veiðuvirksemi passar við fylgissveinaupplýsningarnar.

## Rostock-systrarnar

“Eva”, “Juanita”, “Rosita”, “Isabella” og “Carmen” vera eisini kallaðar fyri Rostock-systrarnar. Trolararnir hava fleiri ferðir verið í Rostock, uttan at myndugleikarnir hava gjørt nakað. Í desembur 2005 vóru trolararnir í Rostock, og brúktu tá nøvnini ”Oyra,” ”Ostroe,” ”Okhotino,” ”Olchan” og ”Ostrovets.” Hesir fimm trolararnir hava í fleiri ár staðið á svartalistanum hjá millum annað NEAFC. Trolararnir hava í fleiri ár verið riknir av russiskum eigarum, og hava verið skrásettir undir bæði russiskum og georgiskum flaggi.



# Sjórænarasystrar gerast



*Rostock-systrarnar verða nú upphøgdar. Talan er um sigur fyri stríðið móti piratveiði*

*Mynd: Greenpeace/Henna Tahvanainen*

**Oslo: Rostock-systrarnar sum í fleiri ár hava fiska kongafisk uttan loyvið, eru farnar til upphøggingar, vísa myndir frá Greenpeace. Ein sætti ránsbátur er á veg sama veg.**

FISKIVINNA

*Jógvan H. Gardar*

Enniberg, sum fiskar í Irmingarhavinum, hevur higartil í ár ikki sæð nakað til fremmand fiskiskip uttan fiskiloyvi og uttan flagg. Hetta sigur skiparin Sonny Johannesen við Sosialin. Støðan var ein onnur tá Enniberg var um somu leiðir fyri einum ári síðani. Serliga bitu eftirlitisskipini og tey lógligu skipini í trolararnar sum eisisni kallast Rostock-systrarnar. Hesar høvdu tá nøvnini ”Juanita”, ”Eva”, ”Isabella”, ”Rosita” og ”Carmen.” Ringt var at siga hvar tær hoyrdu heima, og ikki fekst samband við tær.

Hesar seinastu vikurnar eru tær komnar til lettiska havnabýin Liepaja. Fyri fáum døgum síðani kundi myndamaðurin hjá Greenpeace, Henna Tahvanainen, senda myndir frá Liepaja sum vísa at systrarnar nú vera upphøgdar. Sambært upplýsningum sum Greenpeace hevur fingið á skipasmiðjuni, so eru allir fimm trolararnir á veg til upphøggingar.

### Seks trolarar

- ”Juanita” er longu upphøgd, ”Eva” verður høgd upp nú, og ”Isabella” kom seint í farnu viku til Liepaja. Harafturat er avtala gjørdum upphøgging av teimum báðum seinastu trolarunum ”Rosita” og ”Carmen”, ið nú eru á veg til Lettland, og teir koma til Liepaja í hesi vikuni, sigur Truls Gulowsen, ið hevur staði á odda fyri Greenpeace-átakinum móti flaggleysu og ólógligu trolarunum.

Av NEAFC-skrivstovuni í London frætta vit at ein annar piratur, ”Ulla”, eisini er á veg til upphøggingar. Sostatt eru seks av piratunum sum vóru í Irmingarhavinum í fjørð á veg til upphøggingar.

- Tað er uppá tíðina at hetta hendir. Vit hava í fleiri ár barst fyri at fáa steðga hesum trolarunum ið hava fiska ólógliga, og sum opinbart hava brotið NEAFC-reglugerðirnar. Álíkavæl hava vit sæð at fleiri ES-lond, ið eisini eru við í NEAFC, hava latið hesar trolararnar koma og fara úr havnarbýum í Póllandi, Týskalandi og Litava. Einki av londunum hevur roynt at steðga virkseminum, sjálvt um tey hava vita um ólógliga virksemi hjá teimum, sigur Truls Gulowsen. Hann er skuffaður yvir manglandi viljan og kanska eisini evnini hjá myndugleikunum í teimum londunum sum kundu havt gjørt nakað.

- Men eg eri sera væl nøgdur at vitn ú við egnum eygum hava sæð at trolararnir ongantíð aftur koma at fiska ólógliga eftir hóttum fiskastovnum, sier Gulowsen.

### Endin

Trolararnir sum nú eru á veg úr flotanum hava í fleiri ár liva eina fjakkandi tilveru. Trupult er at finna